VIÐMERKINGAR

# Arbeiðssteðgur og eftirlønir v.m.

Jógvan Sundstein



At sita í frástøðu og eygleiða gongdina í føroyska samfelagnum seinastu tíðina gevur einum rættiliga nógv at hugsa um. Frástøðan ger, at ein fær meiri tíð og frið at hugsa, samstundis sum ein helst er nøgdur við, at avgerðarrætturin og avgerðarskyldan liggur á øðrum enn einum sjálvum.

Men sum fyrrverandi politikkari og fyrrverandi semingsmaður kann eg kortini ikki lata vera við at koma við nøkrum viðmerkingum, sum bæði hava samband við arbeiðsmarknaðarviðurskiftini í Føroyum og eisini við tað, sum seinast hevur verið frammi um skattalættar og samhaldsføstu eftirlønarskipanina.

## Arbeiðsmarknaðurin

Tað er eygsýnt, at vantandi høvuðsavtalur, vantandi arbeiðsrættur og tann alt ov spjadda fakfelagsrørslan er til stóran bága fyri arbeiðsfriðin í Føroyum. Tað er púra greitt, at slík viðurskifti, sum lemja samfelagsvirksemið við verkføllum bæði tíðliga og seint, eru ótolandi. Tey hoyra ikki heima í einum nútíðar samfelag og gera, at Føroyar sum frálíður verða minni og minni áhugaverdar fyri vanligan vinnuligan aktivitet. Hetta er galdandi bæði fyri landsins egnu íbúgvar og fyri útlendsk vinnulig áhugamál. Tað at stuttir arbeiðssáttmálar verða gjørdir, og at ongar samráðingar og justeringar verða gjørdar millum avtaluterminirnar er negativt. Tað at nógv fakfelag hava sínar sjálvstøðugu sáttmálar, og ofta við ymiskum terminum, er eisini sera ørkymlandi, tí tað hevur við sær vanda fyri fleiri ymiskum "smáverkføllum", sum kunnu hava skaðiligar fylgjur. Eisini er rættarstøðan á arbeiðsmarknaðinum ótrygg, tí eingin lógar- ella avtaluásettur arbeiðsrættur er virkin.

Eisini síggja vit ávísa kapping millum fakfeløgini. Ein kapping, sum bæði er til skaða fyri løntakarnar sjálvar og fyri alt samfelagið. Til dømis gjørdu partarnir á privata arbeiðsmarknaðinum ein ógvuliga sámuligan sáttmála fyrr í ár við eini sokallaðari null loysn. Nú kemur almenni arbeiðsmarknaðurin, og hesir vilja ikki góðtaka null loysnina, og so hava vit verkfallið. Eg ivist ikki í, at ein partur av orsøkini til, at ein ódramatisk loysn varð funnin í vár, var, at vónir vóru um skattalætta, og at umframt avtalaðar eftirlønarbatar eisini vónir vóru um, at samhaldsfasti grunnurin fór at hækka. Men hetta var ikki nóg mikið fyri Starvsmannafelagið, og tí fekst ein loysn nú í oktober, sum helst skapar ónøgd hjá arbeiðarafeløgunum. Tað hevur so aftur við sær trupulleikar næstu ferð samráðingar skulu vera. Og um ongar kontaktir eru millum partarnar í millumtíðarbilunum, so hava vit aftur eina spenta støðu tá næstu samráðingar vera.

So skulu aftur semingsfólk inn í myndina, og tá kasta samráðingarpartarnir ofta ábyrgdina frá sær og leggja hana á semingsmenninar. Síðani verður bæði av pørtunum og fjølmiðlunum bíða eftir og rópt eftir semingsuppskotum. Í parantes skal eg viðmerkja, at mangan havi undrast yvir at hoyra í tíðindafluttninginum, at sagt verður: "enn er einki semingsuppskot lagt fyri partarnar" ella "semingsmennininir siga, at semingsuppskot kemur ikki enn" ella okkurt líknandi. Tá samráðingar eru, og semingsfólk eru við, skal helst einki semingsuppskot koma. Samráðingarnar skulu mýkjast so nógv og leingi, at partarnir til síðst semjast uttan nakað formelt semingsuppskot.

## Skattalætti og samhaldsfasti

Eg hvakk við, tá eg sá á netinum í gjár, at fólkapensionistar í Føroyum missa 1.000 kr. um mánaðin. Tá ið eg hevði lisið greinina fataði eg, at so galið var tað kortini ikki. Tað snúði seg um, at vandi var fyri, at komandi hækking av gjaldinum frá samhaldsfasta ikki fór at vera framd. Men hetta er í sjálvum sær eisini nóg galið.

Tað skilst, at landsstýrið og samgongan tvinnar saman lyftini um skattalætta og hækking av gjaldinum til og frá samhaldsfasta. Tað er rætt at lækka persónsskattin, men sjálvandi skal tað gerast við skili, soleiðis at tað fremur arbeiðshug og harvið búskaparligan vøkstur. Tí eigur hetta at verða gjørt, men tað er samstundis ein politisk meting nær og í hvussu stóran mun.

Hinvegin er lyfti um hækking av inntøkuni hjá teim eldru við einum gjaldi frá samhaldsfasta eftirlønargrunninum eitt lyfti, sum eigur at vera hildið. Tað hevur við sær, at inngjaldið til grunnin eisini hækkar. Men inngjaldið er býtt út á nógv fleiri herðar, og merkist tí ikki so ógvisligt.

Eg skal viðganga, at tá samhaldsfasti frá fyrstu tíð kom, var eg ímóti skipanini. Men sum tíðin er liðin, og eg havi sæð skipanir aðrastaðni, eri eg komin á aðrar tankar. Eisini trúgvi eg, at tað vandamál, sum nógv verður talað um, til dømis her í Danmark, um vælferðarsamfelagið í framtíðini klárar lutfallið millum færri vinnuførur og fleiri eftirlønt, betur verður loyst við føroysku skipanini.

Føroyska skipanin við eini lutfallsligari lágari fólkapensións grundupphædd, sum er skattafrí, og síðani einum hækkandi samhaldsføstum gjaldi, vil sum frálíður virka betur enn til dømis tann danska.

Í Danmark hevur tú eina nakað hægri fólkapensión, men hon er øll skattskyldug. Síðani fært tú bert ATP, um tú hevur goldið inn til skipanina, og eftir hvat eg skilji er upphæddin ikki serliga stór.

Fólkapensionistar í Føroyum hava tað tí minst líka so gott sum í Danmark.

Í báðum londum kunnu fólk, og tað gera tey væl meira í framtíðini, sjálvandi eisini hava sínar egnu eftirlønarskipanir.

Grundvøllurin undir eini tryggari skipan fyri fólk, tá tey eldast, er sostatt eftir mínari uppfatan, at fólkapensiónsupphæddin verður varveitt við líðandi hækking, og at skattfrælsið fyri grundupphæddina verður varveitt. Harafturat kemur so gjaldið frá samhaldsfasta, sum um nøkur fá ár kann koma uppá nakrar túsund krónur um mánaðan.

Tann lovaða økingin av samhaldsfasta eigur tí fremjast, sjálvt um skattalættin ikki fulltút kann fremjast.

# Er hetta støðið í føroyskum politikki, Kaj Leo?

Høgni Hoydal



Formaður Sambandsfloksins hevur javnan gjørt seg til talsmann fyri, at persónsálop ikki skulu mynda føroyskan politikk. Har eru vit rørandi samdir.

Hví Kaj Leo Johannesen hevur slept hesum máli og er dottin í somu grøv sum samgongufelagar hansara, er mær ókunnugt.

Í lesarabrævi í bløðunum í gjár, svarar Kaj Leo Johannesen einum fyrispurningi frá Jógvani Jacobsen, ið reisir ein prinsippiellan spurning um rættin at hava egnar meiningar og at bera tær fram. Hann vísir til eina yvirlýsing frá Norðoya Sambandsfelag.

Men Kaj Leo Johannesen svarar ikki spurninginum. Ístaðin fer hann beint í somu grøv, sum vit kenna so væl í føroyskum politikki: Hann leggur eftir manninum og eftir Tjóðveldisflokkinum við grovum ósannindum.

## Koyr í bás og sig eina lygn

Jógvan Jacobsen er eisini formaður í Unga Tjóðveldinum, sum er eitt sjálvstøðugt felag, ið ikki er bundið av Tjóðveldisflokkinum. Kortini koyrir Kaj Leo Johannesen beinanvegin Jógvan Jacobsen í bás og gevur honum ábyrgdina fyri tí, ið Tjóðveldisflokkurin ger. Síðani sleingir Kaj Leo Johannesen fordómar og ósannindi út um Tjóðveldisflokkin.

Formaður Sambandsfloksins skrivar: "*Sambandsflokkurin hevur onga samtykt av tí slagnum, sum hana hjá tingbólki Tjóðveldisfloksins, um at tinglimur, sum alment finst at formanninum, hevur sett seg uttanfyri tingbólkin. Í okkara flokki røkkur talufrælsið nógv longri enn so.*"

Hetta eru grov ósannindi frá formanni Sambandsfloksins. Tingbólkur Tjóðveldisfloksins hevur ongantíð samtykt, at ikki skal finnast at formanninum. Tvørturímóti. Hevur Kaj Leo Johannesen nakað dømi, at tað ikki er loyvt alment at finnast at formanninum í Tjóðveldisflokkinum? Kennir Kaj Leo Johannesen nakað dømi um, at formenn í øðrum flokkum hava fingið tær atfinningar alment, sum verið hava í Tjóðveldisflokkinum?

Veruleikin er tann, at tingbólkur Tjóðveldisfloksins hevur samtykt, at tinglimur, ið fremur persónsálop, setur seg uttanfyri tingbólkin.

Tað átti at hóvað Kaj Leo Johannesen í mun til tað, sum hann sjálvur førir fram alment.

## Limablað Sambandsfloksins sama støði

Men hann velur persónsálopið og fordómarnar til tess at sleppa undan orðaskiftinum um prinsippiell mál. Harmiligt er tað, at ein so nýggjur formaður sum Kaj Leo Johannesen longu er farin at leggja hetta støðið í føroyskum politikki.

Tað ger tað ikki frægari, at Sambandsflokkurin í hesi vikuni hevur sent eitt limablað út, har eisini beinleiðis ósannindi verða førd fram um Tjóðveldisflokkin. Í einari grein í limablaðnum verður tað lagt fram sum ein gøla og eitt slag av avdúking, at formaðurin í Tjóðveldisflokkinum skal hava roynt at fjala avleiðingarnar av blokkstuðulsniðurskurðinum, innan ætlaðu fólkaatkvøðuna í 2001.

Aftur her verða grov ósannindi førd fram. Ætlaða fólkaatkvøðan í 2001 snúði seg um at taka undir við ella vraka uppskotið um sjálvstýri Føroya fólks. Í hesum uppskoti varð greitt ásett, at øll málsøki skuldu á føroyskar hendur og blokkstuðulin minkast burtur innan ávíst áramál. Og í uppskotinum, sum skuldi til fólkaatkvøðu, varð eisini týðiliga greitt frá, hvat hetta fór at kosta og hvussu nógv blokkstuðulin minkaði hvørt árið.

Eg fari tí at spyrja Kaj Leo Johannesen, um hann ætlar, at hetta skal verða støðið í føroyskum politikki frameftir? At flokkarnir, heldur enn at leggja síni egnu sjónarmið og grundgevingar fram, varpa út ósannindi um Tjóðveldisflokkin?

## Man tað ikki vera skemt?

Hinvegin, so rokni eg við, at Kaj Leo Johannesen í veruleikanum hevur skrivað eina skemtigrein, sum ikki skal takast í álvara. Tí í somu grein skrivar Kaj Leo Johannesen eisini:

"*Styrkin við eini breiðari samgongu er, at hon forðar fyri, at lægsti felagsnevnari, ella ein absoluttur minniluti, rekur føroyskan politikk. Tær fylgjurnar kenna vit alt ov væl til í Føroyum.*"

Hetta prógvar, at Kaj Leo Johannesen í veruleikanum er ein stórur humoristur, og at hann megnar ta torføru dygdina at leggja fram sjálvspei.

Tí hetta er í veruleikanum ein framúr speisom lýsing av gongdini í sitandi samgongu. Tann lægsti felagsnevnarin rekur politikkin. Ongar avgerðir verða tiknar og ongar grundgevingar lagdar fram. Einasti felagsnevnari er at leggja eftir andstøðuni og at fremja persónsálop móti teimum, ið loyva sær at finnast at.

Seinasta dømið sóu vit í tinginum seinasta mikudag. Tá viðgjørdi tingið eitt uppskot frá Miðflokkinum um at steingja Norðskálatunnilin og lata gamla Smyril sigla á Skálafjørðin, meðan tunnilin verður umvældur. Men tinglimir úr Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum megnaðu at brúka alla sína talutíð til at leggja eftir Tjóðveldisflokkinum og geva honum og minkaða blokkstuðulinum skyldina fyri standin í Norðskálatunlinum.

Skemtiligt er tað at fáa skyldina fyri alt millum himmal og jørð. Ja, vit kunnu bara viðganga tað beinanvegin, at Tjóðveldisflokkurin hevur skyldina í, at heystið hevur verið so vátt í ár.

Men fyri støðið og framtíðina í føroyskum politikki er verri at bera eygað við tað skemtiliga.